# Ferðasíðan hjá Sosialinum

62°N

# JÓLAHUGNI
# Í TÝSKLANDI

## 6. - 10. desember 2007

**Tak eitt vikuskifti í desembur úr kalendaranum og uppliv eina ørvísi og hugnaliga jólaferð**

Saman við Risskov Rejser skipa vit á 62°N fyri ferð til Gluckstadt, Stade, Hamburg og Lubeck at uppliva teir hugnaligu, týsku jólamarknaðirnar. Her er sum at koma í eina dreymaverð. Hugnaligi jólahýrurin er í hásæti við nógvum jólabúðum, nissum í hundraðtali, einglar, angandi grann og jólatrø.
7. des. verður koyrt í bussi frá Vejle til Týsklands og gist verður í býnum Gluckstadt.
Fyrsti, langi steðgurin verður í Stade, har møguleiki verður at uppliva og granska býin og hugnaliga jólamarknaðin. Býurin er eisini kendur fyri teir mongu spennandi serhandlarnar.
Gerst ein troyttur í beinunum av øllum jólastákinum, so er bara at seta seg við eina av teimum mongu jólabúðunum og njóta eitt glas av "gluhwein" og onkrum góðum afturvið.

8. des. verður koyrt fram við ánni Elben, gjøgnum fleiri lítlar býir til Hamburg. Har verður rundferð í býnum og síðani verður vitja á stóra jólamarknaðinum, ið hevur alskins jólalutir og vøkur listahandverk.

9. des. verður farið til Lubeck. Høvuðsgøtan og tey mongu torgini rundanum eru øll vakurt prýdd við granni, ljósum og guirlandum. Her er møguleiki at keypa forkunnugt jólaprýði og gávur, ið ikki fáast til keyps aðrastaðni.
Við eina av býar-kirkjunum, eru ævintýrini, hjá brøðrunum Grimm um Tornurósu, Teir 7 smáu dvørgarnar, Øskufíu, umframt aðrar ævintýrpersónar, næstan vorðin livandi av leikmyndum, sum eru settar upp í desembur-skógini av jólatrøum.
Eisini er vert at vitja stóra Niederecks marcipanhúsið. Her finnur tú heilt víst eina leskiliga og øðrvísi mandlugávu.
Farið verður aftur til Vejle seinnapartin 9. des. Gist verður á Golden Tulip Hotel.

10. des. er møguleiki fyri at njóta hugnaliga býin, Vejle, sjálv/ur.

Prísur
**Kr 5.150,-**
fyri hvønn í dupultrúmi
Kr. 770,- eyka fyri einakamar
*Fyrvarni verður tikið fyri prentvillum og prishækkingum*

**Íroknað prísin er:**
- Retur ferðaseðil Vágar - Billund v/ øllum avgjøldum
- Gisting í dupultrúmi v/morgunmati á Hotel Golden Tulip Vejle 6. - 7. des. og 9. - 10. des
- Bussferð til Týsklands við ferðaleiðara
- Gisting í dupultrúmi á Hotel Raumann í Gluckstad 7. - 9. des.
- Morgunmatur og døgurði í Týsklandi

**Ikki íroknað:**
- Drykkivørur
- Atgongumerki
- Avlýsingar og ferðatrygging

**Ferðaskrá:**

| | | |
|---|---|---|
| 6. des. | Vágar - Billund | kl. 11.00-14.00 |
| 7.-9. des. | Ferð í Týsklandi | |
| 10. des. | Billund – Vágar | kl. 20.45-21.45 |

## Hotel Golden Tulip Vejle
er hugnaligt hotel við góðum útsýni yvir Vejle Fjord. Kømrini eru vælútgjørd og hava allar hentleikar.

## Hotel Raumann
er økonomi hotel, ið liggur í hjartanum á Gluckstadt. Kømrini hava sjónvarp og bað.









ATLANTIC AIRWAYS

62°N

**Hoydalsvegur 17 • 100 Tórshavn**
**Tel: 34 00 00 / 34 00 60 • Fax: 34 00 11**
**booking@62n.fo**
**www.62n.fo**